# 100% Heðin – ein atkvøða fyri trivnaði

HEÐIN MORTENSEN
borgarstjóri og valevni Javnaðarfloksins



Í míni tíð sum borgarstjóri hava vit framt eina rúgvu av málum. Men vit vilja fremja enn fleiri mál, so trivnaðurin hjá øllum borgarum í Tórshavnar kommunu verður 100%.

Karmarnar hjá vinnuni skulu framhaldandi betrast og útbyggjast..

Niðanfyri lýsi eg undir hvørjum árstali í stuttum nøkur av teimum mest týðandi málunum, vit hava framt og ætla okkum at fremja í næsta valskeiði.

**Framt í 2005**
Heimið fyri minnisveik við Vallalíð liðugt
Frítíðarskúlin víðkaður til eisini at umfata 2. flokk
Parkeringsøkið við J.Paturssonargøtu liðugt
Økið við Tinghúsgarðin fríðkað
Fløskubásur á Ólavsøku

**Framt í 2006**
Læknamiðstøðin í Kollafirði liðug
Systkinaavsláttur settur í verk
Barnagarðsgjald lækkað
Nýggjur barnagarður í Nólsoy
Nýggj lyfta á Býarbókasavninum
Nýggj roykreinsiskipan til brennistøðina á Hjalla
Fríðkan av umhvørvinum undir Bryggjubakka

**Framt í 2007**
Ókeypis at koyra við Bussleiðini
Røktarheimið Tjarnargarður liðugt
Nýggjur dagsstovnur á Velbastað latin upp
Ítróttarhøllin í Kollafirði liðug
Rættará reinsað

**Framt í 2008**
Eldrasambýlið Oman Mattalág tikið í brúk
Nýggj rennibreyt við Sundsvegin liðug
Spælistaðið Reinsaríið tikið í brúk
Sølutorg í Vágsbotni liðugt
Endurnýtsluhandil latin upp á Hjalla
Herd reglugerð um dálking samtykt

**At fremja í 2009**
Skúlin á Løgmannabreyt liðugur
Arbeiðið við ellis- og røktarheiminum yviri við Strond byrjar
Dansihøllin í Gundadali liðug
Útbyggingin av Tórsgøtu/mentunargøtan heldur fram
Meira innhald í- og fleiri ókeypis tilboð á Ólavsøku
Tónleikatiltakið Asfalt endurreist
Fleiri pláss til smábátar
Betri umstøður til Motorkross koyrarar
Grundstykkir til sethúsabygging
Grundstykkir til vinnulig endamál

**At fremja í 2010**
Skúlin á Argjum liðugur
Fimleikahøllin við Tórsvøll liðug
Ung í arbeiði mennast og víðkast enn meira
Fríðkan av býnum heldur fram
Vegaútbyggingarnar halda fram

**At fremja í 2011**
Nýggjur musikkskúli stendur liðugur
Heilsumiðstøð við Karlamagnusarbreyt liðug
Vardar eldraíbúðir verða bygdar á Óðinshædd
Fleiri smáir bóltvøllir gjørdir

**At fremja í 2012**
Ellis- og røktarheimið yviri við Strond liðugt
Fleiri smábátahavnir gjørdar
Nýtt reinsiverk í Havnardali gjørt
Nýggjur innkomuvegur til Havnar gjørdur

# Valfundir – ein møguleiki at koma til orðanna

**Til: kommunur, politiskar flokkar, kommunufeløg**

SÓLFRÍÐ FJALLSBAK
forkvinna í Demokratiu



Vit í Demokratiu loyva okkum hervið at heita á tygum/tykkum um at skipa fyri valfundum í øllum kommununum, soleiðis at øll valevni hava møguleika at koma til orðanna og greiða frá, hvørjar ætlanir tey hava fyri sínum arbeiði í kommunustýrinum.

Slíkir valfundir eru harumframt eitt gott og neyðugt høvi hjá borgarunum at fáa innlit í tað, sum valevnini standa fyri og vilja arbeiða fyri, og harvið fáa eitt skikkað grundarlag fyri at velja, hvørjum tey skulu atkvøða fyri.

Nú kommunuvalið nærkast, herðist stríðið um atkvøðurnar. Bæði í bløðunum og á portalinum síggja vit valgreinar og lýsingar, har valevni geva lyfti og heita á veljarar um at fáa atkvøðuna.

Fyri valevni kann tað kosta nógvan pening at koma til orðanna, um einasti møguleiki er at skriva lesarabrøv í dagbløðunum ella at hava lýsingar, antin í bløðunum ella á internetinum. Hetta kann merkja, at fleiri valevni ikki hava møguleika fyri at verða hoyrd og at fáa sín boðskap út til veljararnar.

Av hesi orsøk heita vit í Demokratiu á allar kommunur og politiskar flokkar um at skipa fyri valfundum.

# Umráðandi at fara á val

JÓGVAN ARGE
varaborgarstjóri, valevni á Lista E



Fjórða hvørt ár hevur veljarin sín demokratiska møguleika fyri at ávirka gongdina í kommununi. Hesin rætturin til at velja teir 13 býráðslimirnar, sum skula taka avgerðirnar í Tórshavnar kommunu næsta valskeið, eigur at vera brúktur.

Tað er ein sannroynd, at prátið og keglið upp undir hetta býráðsvalið hevur ikki verið av tí mesta. Víst hevur minnilutin roynt seg við skuggaboksing og fantasiríkum ræðumyndum, sum onki hava upp á seg, men annars hevur verið mestsum kvirt.

Ymsar gitingar eru um, hví so er. Ein er, at fólk eru troytt av politikki eftir fleiri val seinasta árið. Ein onnur meting er, at politikkurin hjá okkara býráðssamgongu seinastu fýra árini er so væl frágingin, at fólk yvirhøvur eru nøgd við frambrotini og tænastuna, sum kommunan nú veitir.

Hendan seinna metingin er sjálvandi hugalig hjá okkum, sum hava staðið við endan, men umráðandi er, at vit fáa staðfest hetta nøgdsemi við valborðið týsdagin.

Tað er eisini ógvuliga umráðandi at fáa stuðul frá veljarunum til tær hugsjónir og ætlanir, sum vit hava fyri Tórshavnar kommunu í framtíðini.

Vit leggja dent á at menna høvuðsstaðin, á trivnaðin hjá heildini og virðing fyri borgarunum á bygd og bý.

Tekur tú undir við tí, vit hava gjørt, og tí, vit hava stungið út í kortið, fert tú á val týsdagin og atkvøður fyri valevni á Lista E, sum borgar fyri tryggari leiðslu.

X við E.

# Íbúðarviðurskiftini hjá støkum í Føroyum mugu betrast munandi

ELIN LINDENSKOV
Javnaðarflokkurin



Íbúðarviðurskiftini hjá støkum í Føroyum mugu betrast munandi. Hetta hevur serliga týdning fyri Tórshavnar kommunu, her nógv støk og stakir uppihaldarar eru. Hetta er eitt landsmál, men tá hetta viðkemur so nógvum í Tórshavnar kommunu, haldi eg eisini, at tað er rætt at taka hetta upp til eitt kommunuval. Tórshavnar kommuna má leggja trýst á landsmyndugleikarnar fyri at fáa ætlaða íbúðarpakkan settan í verk. Í íbúðarpakkanum er ein trygg leigulóg, møguleiki fyri lutafelagsíbúðum, mvg-frádráttur til lutafeløg og rentustuðul. Eftir mínum tykki átti íbúðarstuðul eisini at verið settur í gildi í Føroyum eins og í Danmark. Tá íbúðir til støk fyrst og fremst viðkoma Havnar kommunu, mugu vit kommunalpolitikarar eisini royna at fáa landspolitikararnar at skilja, at vit tapa kappingina við Danmark, sum í kanning júst nú er mett besta land í Evropa hjá støkum at búgva í, um vit einki gera. Tá íbúðarpakkin verður samtyktur, kann Tórshavnar kommuna skunda undir at fáa bygt lutaíbúðir, leiguíbúðir og annars skunda undir íbúðarbygging, sum tekur hædd fyri øllum samfelagsbólkum. Ynskir tú betri møguleikar fyri meira fjølltáttaðari íbúðarbygging, eigur tú at atkvøða fyri lista C.

# Tónleikurin

OSKAR EIRIKSSON



Tað var gott, at Reinsaríið bleiv renniverað, soleiðis at tónleikur aftur kundi hoyrast í miðbýnum.

Býráðið er ikki komið á mál við hesum sera vakra bygningi. Har má setast ein ella kanska tvær milliónir av afturat so at, wc, varmi, Isolering og ikke minst eitt annleg verður til tónleikarnar, sum har koma. Tá hava vit aftur eina PERLU í býnum.

Musikkskúlin, hvar bleiv hann av. Fyri einum góðum ári síðani bleiv ein stór verkætlan løgd fram í Müllers pakkhúsið. Har møttust bæði politikarar, arkitektar saman við Sunleifi Rasmussen og musikkskúlalærarum. Nógvur góður tónleikur bleiv framførdur og sjónmyndir blivu vístar á lørift, nógvar talur, ið lovaðu at her skuldi okkurt henda. Síðani hava vit ikki hoyrt eitt orð um musikkskúlan, lat okkum taka hetta fram aftur og fáa tað gjørt í verki. Vit hava so ofta prógvað, at vit hava stór talentir innan tónleikin, so eg skilji ikki hví politikarir ikki gerða umstøðurnar betri á hesum økinum. Verði eg valdur skal musikkskúlin verða eitt av mínum hjartamálum.

X við lista A. Her virka vit.
Les meira á
www.folkaflokkurin.fo